## Nakrir áskoðarar ávegis

Hóast ferðalagið við føroyskum áskoðarum onkra tíð hevur verið størri, so verða føroysku spælararnir ikki heilt uttan stuðul á vøllinum í Kaunas. Eingin beinleiðis áskoðaraferð verður skipað, men sum skilst, so er ein partur av 12. manni á veg til dystin. Onnur, sum hava verið uttanlands í arbeiðsørindum, hava eisini sett seg í samband við FSF við umbøn um atgongumerki, og so verður leiðin hjá hesum løgd framvið Litava, nú tey kortini eru uttanlands.



## Holst hvíldi seg

Christian Lamhauge Holst tók ikki lut í føroysku venjingini seinnapartin týsdagin. – Beini hava bara brúk fyri eitt sindur av hvíld, segði spælarin sjálvur, og staðfesti, at talan á ongan hátt er um nakran álvarsligan skaða. Soleiðis er líkt til, at framherjin, sum so ruddiliga hevur spælt seg á landsliðið seinastu dystirnar, aftur fær pláss sum fremsti maður, tá Jógvan Martin Olsen í annaðkvøld sendir sínar mans á vøllin.

# Torført at endurtaka avrikið



Grikkar hava eitt rættiliga sterkt U21-lið, og tí verður helst neyðugt hjá føroysku fótbóltsalvunum at lyfta avrikið eins høgt, sum teir gjørdu tað í Italia

**Serliga eyðkendi stílurin hjá londunum á Balkan at spæla fótbólt uppá, er ikki serliga hugaligur fyri føroyingar, sum hesa ferð hava nýggjan miðverja**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Eftir tríggjar stórar avbjóðingar á útivølli suðuri í heitaru londunum, fer U-21 landsliðið í morgin fyri fyrstu ferð nakrantíð at spæla undankappingardyst á heimavølli. Fyrsta bríksilið á Svangaskarði verður longu klokkan 14, men hóast talan verður um fótbólt so stutt eftir døgurða vanligan yrkadag, so vóna teir í føroysku leguni at fáa góðan stuðul. Hetta er fyrsta ferðin yvirhøvur, at summir av spælarunum spæla landsdyst á heimavølli.

Úrslitini í heitaru londunum kundu lagt upp til, at úrslitini á heimavølli fara at verða áhugaverd. Eftir 0-1 í Albania. 0-2 í Kroatia og 1-2 í Italia er Grikkaland á skránni í morgin. Men annar av føroysku venjarunum, Bill Jacobsen, heldur ikki, at tað á nakran hátt kann roknast við, at føroyska liðið verður favorittur:

- Vit mugu staðfesta, at besti møguleikin fyri stigi og kanska sigri á heimavølli verður, tá ið vit seinni í heyst fara at fáa vitjan av Aserbadjan. Saman við okkum eru teir styrkismettir lægst í bólkinum. Avrikið í Tirana í juni vísti, at vit kundu spæla javnt ímóti Albania, sum vann við óhepnum brotssparksmálið.

Hvat vita tit um grikska mótstøðuliðið í morgin?

- Teir eru júst komnir av ferð í Aserbadjan, har teir vunnu 2-0. Fyrr hava teir vunnið 4-1 á Aserbadjan á heimavølli. At hava verið eysturi í Aserbadjan og síðani at ferðast heilt norður til okkara er neyvan besta fyritreytin hjá Grikkalandi, men eg ivst onga løtu í, at tað verður ivaleyst hjá okkum at tríva í.

Hvussu spæla teir?

- Í eyðkenda stílinum, sum fótbóltstjóðirnar á Balkan eru kendar fyri. Bóltførleikin er fínur, og sammett við eitt nú Italia, sum vit spældu ímóti fríggjakvøldið, so gongur tað oftast nógv skjótari fyri seg hjá Grikkalandi.

Bill Jacobsen vísir á, at tað skal nógv til at lyfta seg upp eftir arbeiðsavrik av tí slagnum, sum føroyska liðið framdi í Italia fríggjakvøldið:

- Hjá okkum er tað einki sum eitur. Allir mugu arbeiða við fullari megi alla tíðina. Um liðavrikið ikki riggar alla tíðina, so verða vit eirindarleyst sektaðir. Konseptið verður einki øðrvísi, enn tað hevur verið á útivølli. Vit verða tættir í verjuni, royna at vinna returbóltar, og møguleikin frameftir liggur í, at vit fanga teir, tá ið teir ikki eru í verjujavnvág, og tá er tað, at vit mugu royna at spæla skjótt.

### Sam í miðverjuni

Tað er greitt, at í hvussu so er ein broyting skal gerast á føroyska liðnum sammett við liðið, sum stóð seg væl í Italia. Jóhan Troest Davidsen, sum hevur verið stýrimaður í verjuni, er við a-landsliðnum í Litavia.

Nýggjur miðverji verður Sam Jacobsen úr GÍ, sum sat á beinkinum fríggjakvøldið. Sam hevur nógvar royndir á Formulaliðnum hjá gøtumonnum, men har er hann miðvallari og ikki miðverji.

Nýggjur maður í hópinum er Rógvi Holm úr AB, sum er fyrsti úr 1990 árganginum á U-21 landsliðnum.

Tað er greitt, at Christian R. Mouritsen úr Manchester City ikki verður millum teir fyrstu ellivu. Hann spældi smáar tjúgu minuttir fríggjakvøldið, og tað verður vónað, at hann verður førur fyri at spæla eina eitt sindur longri løtu í morgin.

- Christian og Arnbjørn Hansen hava báðir verið skaðaplágaðir. Arnbjørn spælir í Formuladeildini, so tað er kanska møguleiki fyri, at hann fer at spæla eina góða løtu. Christian er í uppvenjing, og vit vóna, at hann verður førur fyri at spæla, tá ið vit fara at eiga heimadystir í oktober, sigur Bill Jacobsen, sum saman við Heðini Askham hevur ábyrgdina av U-21 landsliðnum.

Tað kann gott vera, at liðið í morgin ímóti Grikkalandi fer at síggja soleiðis út: Gunnar Nielsen – Jónas Þór Næs, Sam Jacobsen, Poul Thomas Dam, Einar Hansen – Levi Hanssen – Magnus Olsen, Bogi Løkin, Emil Nolsøe Leifsson, Jóhan V. Gunnarsson – Páll M. Joensen.